# Miðvísur taktikkur fyri at binda føroyingar niður

**– Vit vita, at nýggja ES grundlógin fer at fáa avleiðingar fyri Føroyar, men við miðvísum taktikki hevur danska stjórnin syrgt fyri, at binda føroyingar og grønlendingar niður, sigur Høgni Hoydal**



*– Danska stjórnin ger alt fyri at binda føroyingar niður, nú teir sjálvir eru á veg longur inn í ES og tað eydnast væl, við góðari hjálp frá løgtinginum, sigur Høgni Hoydal*

ES OG FØROYAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

– Tað, sum fer fram í løtuni er miðvísur taktikkur hjá donsku stjórnini í eini roynd at binda føroyingar niður. Og tíverri tíverri hjálpir Føroya løgting væl til.

Høgni Hoydal, fólkatingsmaður er sjálvandi vónbrotin av, at Fólkatingið ikki vil samtykkja uppskotið frá Norðuratlantsbólkinum um at seta eina óhefta kanning í verk fyri at vita, hvørjar fíggjarligar og politiskar avleiðingar tað fær fyri Føroyar, um Danmark góðkennir nýggju ES-grundlógina.

Frammanundan hevði hann eina varisliga vón um, at fólkatingið fór at taka undir við málinum, tí teir vóru allir positivir.

– Men eftir at stjórnin hevur verið í holt við flokkarnir, sær út til at teir hava broytt støðu og nú er greitt, at uppskotið verður felt.

### Danir samráðast við seg sjálvar

Høgni Hoydal sigur, at tað er alneyðugt at kanna út í æsir, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa fyri Føroyar um ES grundlógin verður samtykt.

Men tað er eisini neyðugt at kanna, hvussu tað ávirkar Føroyar, um Danmark tekur av síni fyrivarni og fer at samstarva við ES um ein felags uttanríkispolitikk við einum felags uttanríkisráðharra, um verju- og trygdarpolitikk, um statsborgaraskap og gjaldoyra.

– Trupulleikin er, at Danmark umsitur nøkur málsøki vegna Føroyar og verða tey málsøkini løgd undir ES, fer tað sjálvsagt at fáa avleiðingar fyri okkum.

Høgni Hoydal nevnir nøkur dømi, sum kunnu elva til trupulleikar, men sum als ikki eru lýst.

– Hvat hendir nú um ES fær ein felags hvalaveiðipolitikk? Hvat so við Føroyum og Grønlandi, verða vit umfatað av honum? Hvat nú um Danmark situr við formansskapinum í ES og skal samráðast við Føroyar og Grønland um hvalaveiðimál. Skal Danmark og samráðast við seg sjálvt?

– Hvat hendir um ES lýsir handilsbann ímóti t.d. íslendingum, fyri hvalaveiði?. Eru vit so umfatað av tí?

– Hvat hendir um ES lýsir kríggj? Verða Føroyar og Grønland so umfatað av krígnum og verða okkara land og sjóøkið til taks í krígnum?

Og hvat við útlendingapolitikkinum og visareglum og reglum um, hvør sleppur inn og út í ES? Verða Føroyar eisini umfatað av teimum reglunum?

### Løgtingið hjálpir væl til

Høgni Hoydal sigur, at alt hetta, og nógv annað, eru ivamál, sum tað er alneyðugt at fáa lýst.

– Gongdin er tann, at fleiri og fleiri málsøki verða løgd undir ES og tí er alneyðugt at vit kanna, hvussu hetta ávirkar okkara støðu.

Høgni Hoydal sigur, at sum er heilt burturvið í hesum máli, er, at samstundis sum Danmark er í ferð við at leggja uttanríkispolitikk, verjupolitikk og gjaldoyramál undir ES, hevur Løgtingið samtykt í yvirtøkulógini og uttanríkispolitisku heimildarlógini, at hetta eru málsøki, sum vit ikki kunnu yvirtaka.

– Tað er ongin ivi um, at danska stjórnin hevur strongt á fyri at fáa Løgtingið at samtykkja hesar báðar lógirnar fyri at sleppa undan at fáa trupulleikar av føroyingum og grønlendingum, nú teir sjálvir eru á veg longur inn í ES.

– Tað er heilt burturvið, at føroyingar skulu vera so góðtrúgvnir, at vit hava slept okkum øll kort av hondini, samstundis sum danir eru áveg longur inn í ES, uttan at avleiðingarnar fyri Føroyar eru lýstar.

### Miðvísur taktikkur

Høgni Hoydal sigur, at hetta er einki minni enn ein fólkaræðilig vanlukka fyri Føroyar.

– Tað er ongin ivi um, at hetta er miðvísur taktikkur hjá donsku stjórnini fyri at sleppa undan trupulleikum við Føroyum og Grønlandi og fyri at forða fyri, at danska ríkið syndrast.

– Fleiri røddir í Grønlandi hava boðað frá, at leggur ES gjaldoyra, uttanríkispolitikk o.s.fr, undir ES, mugu føroyingar og grønlendingar sjálvir yvirtaka hesi málsøki at umsita.

– Men nú hevur løgtingið samtykt at vit kunnu ikki yvirtaka hesi málsøki og tað er miðvísur taktikkur hjá donsku stjórnini fyri at binda Føroyar og Grønland niður fyri at sleppa undan trupulleikum í rikisfelagsskapinum, nú ES verður meiri og meiri saman-sjóðað.

Serliga heldur Høgni Hoydal, at Anfinn Kallsberg hevur verið eitt vónbrot á fólkatingi.

– Hvørja ferð, hann er á Fólkatingið, hevur hann stuðlað donsku stjórnini.

Høgni Hoydal sigur, at Anfinn Kallsberg hevur ongantíð givið sína støðu til kennar í hesum máli, fyrrenn á fólkatinginum týsdagin, tá ið hann vísti málinum frá sær.

–Tað var kærkomið hjá donsku stjórnini, tí hon vísti fleiri ferðir til Anfinn Kallsberg, tá ið hon skuldi grundgeva fyri, at vísa uppskotinum um eina kanning frá sær.

Høgni Hoydal sigur, at heldur Anfinn Kallsberg at tað er landsstýrið, sum eigur at taka stig til eina slíka kanning, kundi hann havt tikið stig til at gjørt eina slíka kanning,. hann kundi eisini havt boðað frá síni støðu frammanundan, so at føroyingar kundu sloppið undan at farið í tvíningar á fólkatingi týsdagin.

# Hetta er at leypa uppum føroyskar myndugleikar

**Uppskotið hjá Norðuratlantsbólkinum í Fólkatingi er at máa støðið undan heimildunum hjá Føroya Løgtingi og landsstýrið og tað vil Anfinn Kallsberg ikki vera við til**



*– Norðuratlantsbólkurin hevur átikið sær leiklutin sum eitt mini- landsstýrið niðri á Fólkatingi og tað kann eg als ikki taka undir við, sigur Anfinn Kallsberg*

ES OG FØROYAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er at máa støðið undan teimum heimildum, sum Løgtingið og Landsstýrið hava, og tað vil eg ikki vera við til.

Anfinn Kallsberg, fólkatingsmaður, hevur boðað frá, at hann fer ikki at atkvøða fyri uppskotinum hjá Norðuratlantsbólkinum, sum var til viðgerðar í Fólkatinginum seinnapartin týsdagin.

Tað er somuleiðis greitt, at undirtøka er ikki í fólkatinginum fyri uppskotinum. Norðuratlantsbólkurin hevði skotið upp at biðja fólkatingið seta í verk eina óhefta kanning av, hvørja fíggjarliga og politiska ávirkan tað fer at fáa Føroyar og Grønland, um Danmark samtykkir nýggju ES grundlógina.

– Eg havi avgjørt onki ímóti at málið verður kannað. Eg haldi eisini, at tað er uppá sítt pláss at kanna teir spurningar, sum Norðuratlantsbólkurin reisir. Men eg haldi bara ikki, at tað skal vera fólkatingið, sum skal standa fyri kanninguninum, sigur Anfinn Kallsberg.

### Landsstýrið skal taka stigið

Hann sigur, at tað fyrst og fremst vera landsstýrið og danska stjórnin, sum fyriskipa eina slíka kanning.

– Tann, sum biðjur um eina kanning er eisini tann, sum avgerð, hvat verður kannað. Tað, sum er mest avgerðandi í eini kanning er, hvussu arbeiðssetningurin hjá kanningarnevndini ljóðar.

Anfinn Kallsberg heldur tí, at tað er burturvið at biðja fólkatingið fyriskipað eina kanning um, hvørja ávirkan ES grundlógin fer á Føroyar.

– Tað er at leypa upp um føroyskar myndugleikar, sum eru høvuðsparturin í hesum máli, sigur føroyski fólkatingsmaðurin.

– Tá hevur Norðuratlantsbólkurin átikið sær leiklutin sum eitt minilandsstýrið niðri á Fólkatingi og tað kann eg ikki taka undir við.

Annfinn Kallsberg sigur, at hetta er at máa støðið undan teimum heimildum, sum Løgtingið og Landsstýrið hava fingið og tað vil hann ikki undir nøkrum umstøðum vera við til.

– Sjálvandi skulu allir spurningar kannast. Men tað má fyrst og fremst vera Landsstýrið, sum reisir spurningin og tað má vera útgangsstøðið.

Hann sigur, at so kann støða takast til um slíkar kanningar skulu gerast saman við grønlendskum ella donskum myndugleikum, men tað skulu vera føroyingar, sum taka stigið og fyriskipa arbeiðssetningin hjá eini kanningarnevnd.

– Annars hava føroyskir myndugleikar sett hol á eina ES-viðgerð og um, hvussu vit kunnu fáa eitt betri tilknýti til ES. Ein partur av tí arbeiðnum er at kanna eftir, hvussu ES grundlógin fer at ávirka Føroyar.

– Men fer fólkatingið at samtykkja at samtykkja eina slíka kanning, uttanum føroyskar myndugleikar, hevði fólkatingið samstundis verið við til at máa støðið undan teimum heimildum, sum føroyingar hava og tað høvdu føroyskir myndugleikar, ikki verið fegnir um, sigur Anfinn Kallsberg.